# Nú er klárt til bólkaumfarið

**FS Vágar og Sumba skulu spæla saman við teimum tíggju feløgunum í bestu deildini**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jóannes Hansen*

Í gjár var aftur eitt kavafølv. Tað eru venjarar og fótbóltsspælarar kring landið ivaleyst eins harmir um, sum eitt nú bóndur og bilførarar. Kavin hevur verið fótbóltsvenjingunum og venjingardystunum til stóran ampa. Sunnudagin eydnaðist tað at fáa teir báðar síðstu dystirnar frá hondini, sum skuldu spælast, fyri at tað kundi farast undir bólkaumfarið.

Í bólkaumfarinum eru fyrstu dystirnir á skránni komandi sunnudag. Seks dystir á skránni hvønn dystardagin. Tað vil við øðrum orðum siga, at tað kann skjótt koma stórur brøkur í, um kavin fer at arga. Upprunaliga var ætlanin at 2. páskadagur skuldi vera frídagur. Tá tað var neyðugt at flyta kappingina ein leikdag, varð 2. páskadagur tikin afturat. Páskaaftan er framvegis leysur.



*Vágamenn spældu seg leygardagin fram til bólkaspælið, tá teir vunnu 3-0 á heimavølli móti AB*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Skráin**

Sumba og FS Vágar spældu seg leygardagin í bólkaumfarið. Tað fer at verða spælt í trimum bólkum, sum eru mannaðir soleiðis:

Bólkur 1: Sumba, B36, VB og NSÍ.

Bólkur 2: FS Vágar, GÍ, TB og EB/Streymur

Bólkur 3: HB, B68, KÍ og Skála.

Í bólki trý verður bara spælt norðanfjørðs. Í bólki eitt verður talan um lokaluppgerðir millum VB og Sumba, og B36 og NSÍ skulu tvær ferðir um Suðuroyarfjørð.

Átta av teimum tólv liðunum koma í fjórðingsfinaluna. Síðsta umfarið í bólkaspælinum verður sambært skránni leygardagin 20. apríl. Fjórðingsfinalurnar verða spældar dýrabiðjhudag, sum er fríggjadagin 26. apríl. Fyrru hálvfinalurnar eru settar at vera spældar sunnudagin 28. apríl, og tað verður ikki fyrrenn eftir løgtingsvalið týsdagin 30. apríl, at tað fer at vera greitt, hvørji lið skulu í finaluna. Seinnu hálvfinalurnar eru settar at verða spældar sunnudagin 12. mai.

Komandi sunnudag verður spælt soleiðis: Sumba–B36, VB–NSÍ, FS Vágar–GÍ, TB–EB/Streymur, HB–B68 og KÍ–Skála.

**Ivaleysur sigur og sera tætt**

Vágamenn spæla í ár á Valloyruni í Sandavági. AB kom vestur hagar at verja javnleikin og so dúva uppá eitt mál upp á kontra, tá heimaliðið fór at leggja ov nógv fyri í álopsroyndunum. Hetta órógvaði heimaliðið, sum hevði bóltin nógv tann størsta partin av tíðini, men sum hevði stórar trupulleikar at spæla seg ígjøgnum trunkan av AB monnum í egnum brotsteigi. Tá tað restaðu átta minuttir av 1. hálvleiki glapp, og so var tað bara ein spurningur um, hvussu stórur sigurin skuldi verða. Úr Vágum frætta vit, at AB hevði eitt skot uppá mál, og tað hevði málverjin ongar trupulleikar at taka sær av.

Í Sumba var tað væl tættari, tá B71 vitjaði. Í 1. hálvleiki var heimaliðið kanska eitt sindur grammari, men tað eydnaðist teimum ikki at fáa mál. Í 2. hálvleiki var sera javnt, og tá komu øll trý málini. Nebosja legði heimaliðið framum, tá seinna umfarið var trettan minuttir gamalt minuttir. Bergur Winther rakk akkurát bóltinum, sum tóktist vera á veg út av baklinjuni. Hann lyfti høgt afturum seg, og ein hálvan metur frá málstrikuni stýrdi Nebosja í málið.

Støðan helt sær inntil tað restaðu tíggju minuttir. Tá javnaði Eli Hentze við brotssparki. So var aftur heilt spennandi, men bara í eina lítla løtu. Sumbingar fingu brotsspark, og Eirikur Joensen skoraði sigursmálið. Í báðum førunum, tá hann bríkslaði fyri brotssparki, metti Jens Petur Brattalíð, at verjan í brotsteiginum hevði felt álopsspælara.

**Løgmanssteypið**

**2. umfar**

Sumba–B71 2–1 (0–0)
1–0: Nebosja Velkjovic 58.
1–1: Eli Hentze br 80.
2–1: Eirikur Joensen br 82.

FS Vágar–AB 3–0 (1–0)
1–0: Hannus Olsen 37.
2–0: Kim Poulsen 65.
3–0: Birgir Joensen 74.

# GÍ vann í Klaksvík

**Gøtumenn vunnu sunnudagin steypið í Klaksvíkskappingini til ognar, tá teir eftir brotssparkskapping sigraðu á KÍ í finaluni**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Eina viku seinni enn ætlað varð árliga klaksvíkskappingin avgreidd um vikuskiftið.

Lutakastið lagaði tað soleiðis, at tey bæði fremstu liðini frá í fjør, B36 og GÍ, hittust í aðrarir hálvfinaluni, meðan gomlu arvafíggindarnir, KÍ og HB spældu hina hálvfinaluna.

Úrslitið gjørdist, at bæði høvuðssðarfeløgini taptu sínar dystir. B36 var annars á odda 1-0 ímóti GÍ í hálvleikinum við einum máli frá Bárði Mortansson, men í seinna hálvleiki avgjørdu Súni Fríði Johannesen og Henning dystin til fyrimuns fyri GÍ.

KÍ vann í sínari hálvfinalu ein sannførandi 3-0 sigur á HB. Hjalgrím Elttør legði vertirnar á odda fyri hálvleik, og í seinna hálvleiki kundu Mørkørebeiggjarnir staðfesta sigurin við einum máli í part.

Sunnudagin skuldu so teir báðir seinastu dystirnir spælast. Í kappingini um triðja plássið mátti B36 enn einaferð taka til takkar við 2-1 tapi. Aftur hesa ferð legði Bárður Mortansson B36 á odda, men Uni Arge javnaði fyri steðgin og í seinna hálvleiki skeyt Rókur Jespersen sigursmálið hjá HB.

Í finaluni spældu so GÍ og KÍ. Sum skilst úr Klaksvík var talan um ein hampuliga góðan dyst, har bæði liðini royndu at leggja trýst á mótstøðuna. GÍ legði seg á odda, tá Henning Jarnskor slapp púra leysur móti KÍ-málinum, men stutt eftir javnaði Heðin á Lakjuni fyri KÍ.

Beint fyri steðgin legði GÍ seg aftur á odda, tá Sámal Joensen setti brotsspark í netið, men klaksvíkingar góvust ikki á hondum. Nýggi leikarin, Grímur Vang, sum áður hevur spælt við HB, javnaði eftir steðgin, og tá tað ikki komu fleiri mál, gjørdist neyðugt við brotssparkskapping. Her var GÍ stinnari parturin, og gjørdust teir sostatt vinnarar av kappingini fyri fimtu ferð, og vunnu teir sostatt steypið til ognar.



*GÍ vann um vikuskiftið árligu klaksvíkskappingina, meðan greipuvinnararnir úr B36 máttu taka til takkar við aftasta sessinum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Nýggjur venjari má setast

Longu áðrenn hann hevur havt fyrstu venjingarnar, hevur Jónleif Sólsker boðað frá, at hann kortini ikki fær verið venjari hjá kvinnulandsliðnum í hondbólti.

Jónleif varð annars settur sum venjari í desember mánaði, men broyttar arbeiðsumstøuður í gerandisdegnum hava ført við sær, at hann ikki hevur møguleika at taka sær av hesum.

Enn er ikki greitt, hvønn Hondbóltssambandið ætlar sær at seta sum nýggjan venjara hjá kvinnulandsliðnum.

**-jm**



Sóljan-Kyndil 15-26 (5-10):

# Sóljan misti sessin



*Eftir eina javna byrjan, var tað Kyndil, sum dróg frá, og so hvørt sum málini skolaðu inn, gjørdist stórsigurin alt meira vísur*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Á heimavølli megnaði Sóljan ikki at taka av seinasta møguleikanum fyri at bjarga sessinum í bestu deildini, og so kundi Kyndil draga andan heldur léttari**

HONDBÓLTUR – KVINNUR
*Jákup Mørk*

Tað var lagnudystur á Giljanesi fríggjadagin. Sóljan skuldi í seinasta dystinum taka ímóti Kyndli, og tað var undan dystinum greitt, at taparin noyddist tungu leiðina niður í aðru deild.

Roknast kundi tí við, at talan fór at gerast um ein bæði spennandi og dramatiskan dyst, men hetta varð tó av ongum. Tølini siga sítt týðiliga mál um, at munurin var stórur, og eftir dystin var helst eingin av fjølmentu heimaáskoðarunum, sum siga nakað sum helst ímóti, at Kyndil hevði sigurin uppibornan.

Eftir eina hampuliga javna byrjan, tók Kyndil at draga frá um miðjan hálvleikin, og so gekk tað fyri tað mesta ein veg. Kanska var spælið hjá teimum grønu ikki so ógvuliga sannførandi. Til hetta var týdningurin av dystinum helst ov stórur. Men tað vóru tó einastakar orsøkir, sum gjørdu sítt til, at sigurin gjørdist somikið sannførandi.

Fyrstu løtuna, tá munurin kom í, var tað kanska serliga Fríða Petersen í málinum, sum stóð seg væl. Einar tríggjar ferðir á rað hevði hon fínar bjargingar móti mest sum leysum sóljuleikarum, og tá Kyndil so fekk fulla nyttu úr mótálopunum, gjørdist tað beinan vegin tungt hjá Sóljuni.

Hin orsøkin til stóra munin, var, at hvørgin av útlendsku leikarunum hjá Sóljuni fingu nakran serliga stóran leiklut hesaferð. Asta Petrauskiene, sum ivaleyst verður besti málskjúttin hetta kappingarárið, var hálvskadd. Hon megnaði ikki at stríðast við verjuna, og tá Kyndil so eisini um miðjan fyrra hálvleik valdi at mansverja, var hennara leiklutur mest sum liðugur. Eymu lærvøddarnir loyvdu henni ongan tíð at gera nakra roynd at skræða seg leysa, og uttan størstu hóttanina, var talan um eitt ógvuliga skert vágalið.

Hartil skal leggjast, at hóast Kristina í málinum hevði nakrar bjargingar, so megnaði hon ikki at einsamøll at halda Sóljuni inni í dystinum, og so hvørt sum bóltarnir fuku inn aftan fyri hana, gjørdist vónloysi á liðnum alsamt sjónligari.

Sum dysturin leið, so gjørdist talan um ein tryggan sigur til Kyndil, og tá alt var liðugt, kom til sjóndar, undir hvørjum trýsti kyndilsliðið hevur verið seinastu vikurnar.



*Sjáldan hevur gleðin á kyndilsliðnum verið so stór, sum hon var fríggjadagin, tá liðið tryggjaði sær enn eitt ár í bestu hondbóltsdeildini*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Gleðisrópini harðnaðu fyri hvønn bólt, sum varð sendur í málið, og tá seinasta bríkslið hevði ljóðað, tustu leikarar og onnur av væl mannaða beinkinum inn á vøllin, har øll kundu hálsfevnast og fegnast um, at liðið hevði byrgt fyri vanlagnuni at flyta eina deild niður.

Tað megnaði Sóljan so ikki, men hóast hetta, so tóktust tær meira avkláraðar í niðurflytingarspurninginum enn Kyndil.

Tað er tó líti at ivast í, at talan bert verður um eitt fyribils farvæl til vágaliðið. Í stóran mun er hópurin mannaður við ungum leikarum, og verður hildið fast við hesar, soleiðis at tær kunnu búnast eitt ár í oddinum av aðru deild, heldur enn í botninum av fyrstu deild, so er lítið at ivast í, at talan verður um eina sterkaru Sólju, sum um eitt ár aftur verður at síggja millum bestu liðini í landinum.

**Dysturin í tølum**
**Sóljan-Kyndil 15-26 (5-10)**

Sóljan: Asta Petrauskiene 5 (1), Hertha Jónsdóttir Simonsen 4, Marjun Johansen 3 (1), Sólja Jóanisdóttir 2, Heidi Maria Akselsen 1.
Kyndil: Palma Petersen 5, Marjun Tróndarson 5, Lotte Sørensen 5 (3), Ann Hansen 3, Annika Ljósstein 3, Rakul Napoleonsdóttir Joensen 2, Linda Weihe 1.
Útvísingar: Sóljan 3, Kyndil 1
Brotskøst: Sóljan 2, Kyndil
Dómarar úr Neistanum: Kristian Johansen og Jacob Jónsson. Lága leikferðin gav teimum litlar og ongar trupulleikar.

## Hjalgrím til Onglands

Eftir eina tíð við hampuliga lítlum aktiviteti, eru ungir føroyskir leikarar nú aftur við at gera um seg í venjingum hjá útlendskum feløgum.

Jón Rói Jacobsen úr HB er júst afturkomin av eini ferð til Onglands, har hann hevur vant undir fyrrverandi enska landsliðsvenjaranum, Glenn Hoddle, í Tottenham, og nú slepur Hjalgrím Elltør at royna seg undir einum øðrum fyrrverandi landsliðsvenjara.

Hesa ferð er tað Graham Taylor, sum fyri stuttum tók við venjarasessinum í Aston Villa, sum er venjarin. Graham Taylor var annars venjari hjá Watford, tá tveir føroyskir leikarar fyri nøkrum árum síðani royndarvandi við felagnum, so heilt ókunnugur við føroyskar leikarar er hann ikki, og hvør veit. Kanska fer okkurt at spyrjast burtur úr vitjanini hesaferð.

**-jm**



*Jón Rói Jacobsen er júst afturkomin úr Onglandi, og nú fer Hjalgrím Elttør at royna seg hjá Aston Villa*
*Mynd: Álvur Haraldsen*